MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **5. mars 2019**
Tygara ref.**:**
Máltal**.: 19/00017-8**

**Svar**

**upp á**

**§ 52a fyrispurning nr. 54/2018 frá Magnus Rasmussen, løgtingsmanni.**
**Fyrispurningur um at seta á stovn ein fiskimannaskúla, settur landsstýrismanninum í skúlamálum.**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Verður arbeitt við at fyrireika ein fiskimannaskúla í Føroyum?

**Svar**

**Til 1:** Í løtuni verður ikki arbeitt við at fyrireika ein fiskimannaskúla í Føroyum, men landsstýriskvinnan ætlar at endurskoða økið í næstum. Tað er átrokandi at menna útbúgvingar til tørvin á arbeiðsmarknaðinum og serliga innan høvuðsvinnu okkara fiskivinnuna. Ætlanir eru at byrja hesa tilgongd saman við viðkomandi skúlum, stovnum, feløgum og vinnuni skjótast.

Nevnast kann, at fyri knøppum 12 árum síðani varð bjóðað út yrkisútbúgving innan fiskireiðskap, sbrt. kunngerð nr. 81 frá 22. august 2007 um yrkisútbúgving innan fiskireiðskap - serliga trol og nót. Henda lærlingaútbúgving varð skipað við einum skúlaparti í táverandi Fiskivinnuskúla í Vestmanna. Ein lærlingur var útbúgvin eftir hesari skipan, so áhugin fyri hesi útbúgving var ikki stórur.

Sum er leggur okkara skúlaskipan upp til nakað av undirvísing og starvsvenjing (praktiska læru) innan sjómansskap og fiskivinnu bæði í fólkaskúla og í miðnámsskúla, har nomið m.a. verður við fiskireiðskap, fiskimið, fiskasløg og hagreiðing av fiski o.a. Farið verður at kanna, hvussu nógv hesi fylla í samlaðu faktisku skúlagongdini í landinum, og hvør tørvurin annars er.

Mentamálaráðið fer at virka fyri at skapa tilvit um tað, sum finst innan skúlaskipanir okkara, sum vendir sær beinleiðis til okkara høvuðsvinnur, eins og at finna fram til, hvørji skeið ella hvørjar útbúgvingar mangla ella kunnu verða bøttar til at røkka endamálinum, at vit í Føroyum altíð hava viðkomandi útbúgvingartilboð, sum eru tætt tengd at okkara høvuðsvinnum.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Hanna Jensen
*landsstýriskvinna*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo